# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Pætur Háberg 50 ár



Í dag, týsdagin 15. februar, fyllir Pætur Hjørtur Háberg í Hoyvík 50 ár.

Pætur er havnarmaður, sonur Hjørdis, f. Næssaa, og Petur W. Háberg.

Eftir lokna skúlagongd fór hann á háskúla í Haslev. Áðrenn tað hevði hann sum 15 ára gamal longu verið ein túr til skips við gomlu Sólborg. Leiðin gekk síðani á handilsskúla í Danmark. Hann var eisini nakrar túrar til skips í hesum tíðarskeiðinum.

Hann fór síðani í skrivstovulæru á Føroya Fiskimannafelag. Síðan 1. mai 1980 hevur hann starvast á Elektron, har hann í ár kann halda sín 25 ára starvsdag.

Hann er giftur við Annu, f. Eldevig, úr Fuglafirði. Børnini eru: Petur, Kristina, Guðrun og Hjørtur.

Pætur er musikalskur sum fáur, og hevur hann sín heilt serliga stíl. Tú lærir nógv av at sita og lurta eftir tónleiki saman við honum, og tað er eins og ein heilt annar tónleikaheimur opnar seg fyri tær. Ein lærir at lurta øðrvísi. Hettar sæst best á hansara yngsta soni, sum kann sita saman við pápanum og lurta, spæla og syngja løg eftir Steely Dan.

Pætur hevur spælt nógv saman við Nicodemussangbólkinum, sum var í 70 og 80-unum. Í dag spælir hann mest í samkomuni Lívdini, har tey í 2003 vóru á eini sera góðari konsertferð í Írlandi. Eisini var hann ein dyggur stuðul við útgávuni av fløguni »Eg eri ein K«, har hann við sínum kræsna musikalska oyra stuðlaði til, at framleiðslan bleiv so góð sum gjørligt.

Pætur hevur eisini stóran áhuga fyri fótbólti. Í enskum fótbólti heldur hann við Liverpool, og innan føroyskan fótbólt er hann íðin HB viðhaldsmaður.

Vit ynskja tær hjartaliga tillukku við 50 ára degnum.

**X.**

## Sorgardagurin 14. februar 1944

Tann 14. februar 1944 var sorgardagur fyri Porkeris bygd, tá maskinbáturin »Louisa« gekk burtur við fýra monnum, og teir vóru: Dánjal Pauli Veihe (Palli í Køkini) og sonur hansara Símun og so brøðurnir á Heyggi, Hans og Johannes Godtfred.

Tá 50 ár vóru liðin í februar 1994, var minningarfrásøgn um hesa hendingina og somuleiðis tveir sangir, sum vóru yrktir í 1944 um skaðatilburðin.

Men seinni er tað komið fram, at ein triði sangur eisini varð yrktur um hesa vanlukkuna, men hann er ongantíð komin alment fram, og tann sum yrkti henda sangin var abbi okkara, Christian M. Christiansen, Porkeri.

Soleiðis sum pápi okkara Johan Christiansen, Porkeri, nú 93 ár, minnist sangin, verður hann prentaður her.

Er tað onkur, sum hevur henda sangin í varðveitslu ella minnist okkurt brot, sum ikki er við her, verður viðkomandi vinarligast biðin um at gera vart við seg.

Heilsan
**Kristina Magnussen**
*Vágur 7. febr. 05*

Lag: Klynke og klage

1
Sorgarboð tungu nú ganga um landið,
ei er tað fyrstu ferð, at hetta sker,
slitið bleiv kærasta hjúnabandið,
sonur við pápa í ferðini er.

2.
Tveir vóru bundir við brøðranna bandi,
fýra í tali var manningin øll,
um middag »Louisa« hon legði frá landi,
klikkini hoyrast so títt og so snjøll.

3.
Gingu tey saman í svikaráðum
stormurin sterki og aldan harvið,
týna vit skulu alt manndómsins verkið,
ikki eitt borð lata eftir eg vil.

4.
Brúsandi aldan móti klettinum brýtur,
sigrandi hásong hon syngur í dag,
vinmaður hennara stormurin súsar,
verk teirra fella so væl tá í lag.

5.
Østust tey upp tá í megi og veldi,
ongin á foldini sá teirra neyð
uttan tann skúmandi – froysandi bára
og onkur fuglur á leiðini fleyg.

6.
Manga tit veiðina drógu av grunni,
tykkara lutur at fiska jú var,
hana so væl tú í skutunum goymdi,
til hon sum silvur á støðini lá.

7.
Veðrið tað versnar, sum dagurin líður,
tá kvøldið er komið, tá vorðin er ónd,
barnið tað trýstir andlit mót rúti,
starir ta út í ta kolasvørtu nátt.

8.
Báturin var millum okkum eitt prýði
stórur og sterkur og vakur hartil,
aldurnar skar hann og streymarnar stríðu,
mangur í bygdini sakna hann vil.

**Christian M. Christiansen**

## Minningarorð um elskaðu ommu mína Thomasia Kjærbo Sumba



Góða Másomma. Eg vil byrja við at takka tær fyri alt tú hevur verið fyri meg og okkum øll í húsinum. Takk fyri at tú vart hjá okkum í 10 ár og passaði meg tá, eg var lítil, so mamma kundi arbeiða. Tú hevur lagt nógv gott í meg og hini ommubørnini. Eg havi so nógv góð og rík minnir um teg, sum vit báðar hava havt saman. Minnist aftur á, hvussu ofta eg var í Sumba við tær og ferðaðist.Tað var so stuttligt at sleppa at hoyggja saman við tær eysturi í Rætt. Eisin dámdi mær altíð so væl at lurta eftir, tá tú fortaldi um hendingar frá gomlum døgum av, og hvussu tað var at liva tá í tíðini. Tú dugdi so væl at greiða frá, at man sá alt so livandi fyri sær.

Másomma, eg sakni teg so ómetaliga nógv. Nú stendur Billhús í Sumba tómt. Minnist hvussu fjálgt tað var at koma suður til tín. Tú dámdi so væl at fáa vitjan av tínum kæru, og føldu vit okkum øll sum heima hjá tær. Blíðskapurin var stórur og nýttu vit hvørja løtu saman við tær. Hjá tær vóru øll vælkomin. Hóast tú treivst væl norðanfjørðs, so lá Billhús tær altíð nærmast at hjarta.

Másomma, tú vart ein Gudrøkin kvinna, sum eg altíð minnist lesa úr Guðs Orði. Minnist hvussu væl tú dámdi at fara til Nesvíkar við Sjómanskvinnuringinum í Sumba á legu. Ja sjálvt um tú vart blivin gomul av árum, so gleddi tú teg sum eitt barn og livdi leingi uppá tey upplivilsir tú fekk har. Tær dámdi so væl at verða har, sum Guds orð var at hoyra. Tað var uttan iva tín sterka trúgv, sum helt tær uppi, tí tað var ikki altíð so nemt hjá tær omma. Tú komst ikki gjøgnum lívið, uttan at hava upplivað djúpar sorgir tætt inn at tær, hugsi um at tú misti ein son og einastu dóttir tú fekk, bæði sum smábørn. Eisini bleivst tú einkja fyri nógvum árum síðan, hvar tú bleiv bæði mamma og pápi at synum tínum.

Sjálvt um tú vart blivin gomul, so vildi tú klára teg sjálva, og tað gjørdi tú eisini avbera væl. Heimið var altíð væl ansað. Tú vart tann typan, sum ikki dámdi at verða bundin av nøkrum. Ein sterk kvinnu-fyrimynd, vart tú! Hendurnar hevði tú sjáldsama góðar og eisini fylgdi tú so væl við í øllum samfelagsviðurskiftum, so tú kundi snakka við um alt, bæði politik og ítrótt.

Tú hevur altíð fylt so nógv í familjuni, tí øll hava verið so góð við teg og tú við okkum. Tað var so deiligt at hava teg millum okkum, tí tað var altíð okkurt á skránni, tá tú vart nær. Nógvar stuttligar løtur hava verið, tí omma tú vart altíð so kvik í orðum, lívsglað og skemtilig. Tað umsorgan tú hevði til okkum øll í familjuni, boðar frá tínum hjartalag og kærleika til hvønn einstakan av okkum. Minnist hvussu tú altíð ringdi norðureftir fyri at vita, um øll høvdu tað gott.

Kamarið, sum var títt kamar hjá okkum, stendur tómt nú. Tað kennist tungt at vita, at tú aldrin kemur aftur á vitjan, sum tú vart so von við, men nú vart tú blivin troytt omma. Aldurin var farin at krevja sítt, og var tað tungt at síggja teg vikna burtur, eftir at tú fekk heilabløðing. Tó fingu vit mangar góðar løtur saman við tær undir sjúkraleguni. Sjálvt um tú onki fekk sagt, dugdi tú at vísa okkum hvat tú meinti við. Ja sjálvt meðan tú lá á Røktarheiminum, sýndi tú okkum tann vælkenda kærleika og umsorgan, sum er stórliga saknaður nú tú ikki ert millum okkum meir. Um eg var kedd, so kelaði tú mær eftir kjálkanum og turkaði okkurt tári burtur, tí tað var mangan hart at síggja teg vikna burtur omma. Tú vart ein klók kvinna og dugdi uttan iva at síggja, at tað gjørdi okkum kedd og royndi tú at gera títt fyri at ugga sum best, sum tú altíð vart klár til. Tá vit komu at vitja teg, so tók tú í hondina á okkum og smíltist. Ja tú dugdi at vísa, at tú kendi okkum væl, sjálvt um tú ikki fekk sagt tað.

Tað var so nógv annað eg kundi nevnt, men velji at steðga nú. Hóast stóran sakn eftir teim sum eru farin undan okkum, so er uggi at finna, at ein dag, so hava vit øll møguleikan at síggja okkara kæru aftur heima hjá Gudi. Til endans vil eg siga tær takk fyri allan kærleika, umsorgan og fyri at vit altíð kundu líta á teg í øllum. Takk fyri alt, góða Másomma!

**Við virðing**
**Ása**

**Dagurin**

**15. februar, Faustinus,** deyður umleið ár 120. Brøðurnir Faustinus og Jovita í Brescia í Norðuritalia vórðu píndir og tiknir av døgum.